# Abstraktar damur 100 ár

**Hundrað ár eru liðin síðani, spanski málarin Pablo Picasso (1881-1973) málaði høvuðsverkið "Demoiselles d´Avignon", sum skelkaði og kollvelti listaheimin og gjørdist grundarsteinur undir modernaðu myndlistini og sum enn í dag inspirerar eisini føroysk listafólk**



Meistaraverkið 'Demoiselles d´Avignon' 1907 elvdi til mikla øsing

## List



**Kinna Poulsen**

Hundrað ár eru liðin síðani, spanski málarin Pablo Picasso (1881-1973) málaði høvuðsverkið "Demoiselles d´Avignon", sum skelkaði og kollvelti listaheimin og gjørdist grundarsteinur undir modernaðu myndlistini og sum enn í dag inspirerar eisini føroysk listafólk.

Hetta var t.d. eitt tað fyrsta verkið, sum listamennirnir Anker Mortensen og Torbjørn Olsen nýttu høvið at vitja í MoMA (Museum of Modern Arts) á teirra ferð til New York undanfarna ár. Vit nýta her høvið at hugleiða um verkið og um týdning tess fyri modernaða myndlistina.

### Óskiljandi mynd

Picasso arbeiddi í fleiri ár við skitsum, blýantstekningum og akvarellum til hetta verkið og møguliga var stóri oljumálningurin uppá hálvantriðja metur ikki heilt fullførdur í 1907, tá hann er dagfestur. Í øllum førum stóð hann í mong ár í starvsstovu Picassos og aloftast vendi baksíðan úteftir.

Málningurin varð upprunaliga ikki framsýndur alment; tað vóru bert tey, ið høvdu sína gongd í atelierinum, sum sóu hann og sjálvt um hetta var ein rættiliga sofistikeraður og listakønur vinaskari, ið t.d. taldi progressivar listsavnarar sum Gertrude og Leo Stein, víðgongda listaummælaran Félix Féneon og avantgarde listafólk sum Matisse og Braque, gjørdust tey øll sum ein illa við av myndini, ið varð hildin at vera margháttlig og óskiljandi. Leo Stein lýsti verkið sum tað bera og andskræmiliga órudd, meðan Felix Féneon ráddi Picasso til at halda seg til karikatur í framtíðini. Listahandlari Picassos, Kahnweiler var sannførdur um, at at myndin ikki kundi vera liðug, so ymishættað hon var hvat stíli viðvíkur. Men allarhelst vóru tað listafólkini, ið gjørdust mest uppøst. Braque kendi seg beinleiðis brendan av myndini, "eins og onkur drakk bensin og spýtti eld", meðan Matisse og Derain vóru samdir um, at avvarðandi listamaður mundi vera álvarsliga sálarliga sjúkur og kanska enntá í sjálvmorðsvanda.

### Moderna disharmoni

Men hvør er so orsøkin til uppøstu samtíðarreaktiónina? Vit gera okkum ikki altíð greitt hvussu ótrúliga nógv tíðin ávirkar okkara fatan og tí kann tað í dag tykjast okkum løgið, at ein lutfalsliga dekorativ mynd sum "Demoiselles d´Avignon" kundi elva til slíka øsing. Um vit hyggja at myndini, lýsir hon fimm naknar kvinnur, sum eyðsýniliga standa ella sita modell. Møguliga er hetta eitt bordell, sum vit fáa innlit í; í øllum førum sigst heitið sipa til eitt tílíkt hús í Barcelona, men hetta sigur myndin altso ikki nakað beinleiðis um. Í forgrundini sæst frukt á einum hvítum klæði og harumframt hómast bert restin av sjálvum rúminum, har bakgrundin á løgnan hátt blandast við kvinnuskapini frammanfyri. Myndin er annars so merkiliga hendingaleys og vit fáa einki at vita um hvar vit eru stødd og nær hetta gongur fyri seg. Tann einasti, sum ger nakað er kvinnan vinstrumegin, ið lyftir upp í einum reyðbrúnum klæði. Høgrumegin kemur ein onnur kvinna inn í myndarúmið gjøgnum einar bláhvítar gardinur. Hesar báðar kvinnurnar ramma inn og miðsavna ansin fyri teimum trimum kvinnunum í miðjuni, sum stara beint út úr myndini móti áskoðaranum. Meðan tær tvær kvinnurnar í miðjuni síggja lutfalsliga vandaleysar og klassiskt poserandi út, tykist tann triðja nærum óhugnalig við tí maskukenda andlitinum.

### Vandamikil seksualitetur

Lýsingar av naknum kvinnum eru rættiliga vanligar í klassiskari list. Men um vit hugsa um klassisku myndirnar hjá t.d. Tizian (1477 ella 1488-1576) og Rubens (1577-1640), har nakna kvinnan er symbol uppá harmoni, vakurleika, njóting og nýtt lív, er stórur munur millum hesar og kvinnulýsingarnar hjá Picasso, sum onkursvegna sýnast anti-sensuellar og disharmoniskar. Um tað so er fruktin í forgrundini, sær hon ikki serliga innbjóðandi út. Ikki er tað løgið, at myndin tóktist vinfólkum Picassos óruddilig og disharmonisk. Hon er ógvuliga kompleks og assymetrisk, uppbygd av tvørgangandi skáklinjum í einum klaustrofobiskum myndarúmi uttan ein savnandi miðdepil. Allar umhvarvsstrikur eru knívhvassar og eitt nú enda nógvir av teimum kvinnuligu formunum í spískum vinklum. Serligur dentur er lagdur á eyguni, ið verða framdrigin við svartari, tjúkkari konturlinju. Í staðin fyri at vera sansaliga eggjandi, tykjast kvinnurnar við teirra víðopnu eygum beinleiðis ágangandi.

### Stílbland

Tað var altso ikki myndevnið, sum skakaði vinfólk Picassos, men heldur mátin, myndevnið var lýst. Omanfyrinevnda viðmerking Kahnweilers um ørkymlandi



Ein av abstraktu kvinnumyndunum hjá Ingálvi av Reyni: 'Genta' 1972



Ingálvur av Reyni: 'Liffa' 1981